SEV formaðurin Jákup Sune Lauritsen saman við stjóranum í SEV, Hákun Djurhuus á Arctic Circle ráðstevnu í Reykjavík. Myndir Jan Müller

SEV-formaðurin: Mugu geva okkara íkast til Arktis

Jan Müller

21.10.2015 - 12:03

Oljan.fo

“Tað er umráðandi, at Føroyar sum partur av Arktis, kunnu vera við til at geva øðrum isoleraðum smásamfeløgum í Arktis íblástur, eins og vit kunnu læra av teimum,” heldur formaðurin í SEV, Jákup Sune Lauritsen, júst heimafturkomin av arktiskari ráðstevnu í Reykjavík.

Millum føroyingarnar, sum var við til Arctic Circle ráðstevnuna í Reykjavík farnu dagarnar, var eisini nevndarformaðurin í SEV, Jákup Suni Lauritsen. Hetta er tó ikki fyrstu ferð, at hann luttekur. Hann hevur nevniliga verið við til allar tríggjar ráðstevnunar, sum hava verið seinastu árini. Og Suni Lauritsen dylur ikki fyri, hví hann heldur tað er so umráðandi, at ein stovnur sum SEV er umboðaður á slíkari ráðstevnu. Hesaferð var hann saman við stjóranum Hákun Djurhuus, ið hevði framløgu á Arctic Circle saman við Aksel Johannesen, løgmanni og Sjúrða Skaale, fólkatingsmanni.

“Eg haldi tað er týdningarmikið fyri okkum, sum vara av so týðandi samfelagsstovnum sum SEV, at vit fylgja væl við, hvat hendir á veðurlagsøkinum her norðan fyri, har vit øll skulu búgva.”

Hann heldur tað vera umráðandi at fylgja við, hvat hendir í grannalagnum, og taka til sín vitan og royndir frá teimum, sum búleikast í Arktis. Eisini er tað týdningarmikið, at vit sjálvi, sum hava ment ymsar orkuskipanir og royna at leggja um til grøna orku, bæði kunnu læra og geva aftur til teirra, sum búgva í Arktis, tær loysnir vit hava ment.

Nevndarformaðurin í SEV ivast ikki í, at tað hvør einstakur og hvør einstøk tjóð kann gera fyri at brúka varandi orku, fer at koma øllum heiminum til góðar, og her heldur hann Føroyar vera eitt gott dømi um eina rætta og skilagóða gongd á orkuøkinum.

“Tað er alment kent millum føroyingar og nú vónandi eisini millum øll tey, sum hava verið við á Arctic Circle, at vit arbeiða við eini ætlan um at gerast 100% grøn á landi. Tað er eitt

stórt mál at seta sær. Um vit so kunnu føra hetta víðari til alt tað arktiska økið, so kunnu vit kanska vera við til at broyta heimin uppá ein góðan máta. Vit kunnu ikki bara hava hetta fyri okkum sjálvi í Føroyum. Vit mugu so sanniliga eisini út um landoddarnar og vísa, hvat vit kunnu, og so kunnu vit kanska eisini fáa onnur at koma til Føroya at síggja, hvussu vit røkka á mál við grønari orku, og harvið vera við til at gera Føroyar kendar.

Hvørjar føroyskar orkuloysnir heldur SEV formaðurin so, at onnur lond í Arktis kunnu fáa gleði av?

“Vit eru eitt oyggjaland, og tað merkir, at vit eru einsamøll og skulu klára okkum sjálvi. Vit skulu klára at hava eina skipan í Føroyum, uttan at skula fáa hjálp frá øðrum stórum skipanum. Og nógva staðni í Arktis, har tað ikki er so atkomiligt, har er støðan júst tann sama. Smærri bygdirnar og býirnir í Grønlandi eru t.d. í somu støðu. So kunnu vit vísa okkara lítlu elskipan fram og víðari út til hesi økini, og tey kunnu gera brúk av henni, so kann hetta gerast sera positivt fyri tey og í síðsta enda fyri heimin.”

Jákup Suni Lauritsen heldur tað eisini vera av stórum týdningi at vera til slíka ráðstevnu, tí her møtir tú fólki úr nógvum ymsum londum. Tey hava so møguleika at spyrja um okkum, og vit kunnu fáa nakað at vita frá teimum. So tað er ein sparring millum londini, og tað er gott heldur hann.

SEV formaðurin heldur sjálvur, at umframt at kunna læra av hvørjum øðrum í sambandi við orkumál, at tá tað um vinnu ræður, so eru her eisini møguleikar fyri Føroyar eitt nú innan skipaferðslu, sum jú fer framvið hjá okkum.

“Áhugavert verður at vita, hvussu umhvørvið fer at verða ávirkað av veðurlagsbroytingunum. Fer tað at gerast heitari her, fer Golfstreymurin at verða ávirkaður osfr. Vit mugu ikki grava okkum niður, men so avgjørt tora at vera við til at tosa um øll hesi tingini, tí vit eru ein partur av hesum økinum. Vit kunnu og skulu ikki isolera okkum.”

Jákup Sune Lauritsen hittir føroyska sendiharran í Íslandi, Petur Petersen

SEV formaðurin á fyrstu rød saman við íslendska forsetanum, har SEV stjórin heldur røðu